Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Eirikur í Jákupsstovu, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum

Evni: Almenn atgongd til søguligt tilfar

Spurningar:

1. Hvat verður gjørt fyri at tryggja at gamalt søguligt tilfar, sum til dømis ljóðupptøkur, ið ikki eru partur av savninum hjá Kringvarpinum, verður savnað og varðveitt?
2. Hvørjar møguleikar sær landsstýrismaðurin fyri, at tilfarið verður gjørt atkomuligt hjá almenninginum?
3. Hvussu langt er arbeiðið komið við at gera tilfarið í Savnsgulli atkomuligt hjá almenninginum?

Viðmerkingar:
Í Føroyum hava vit eitt stórt tal av søguligum tilfari, ið liggur spjatt og óskipað í posum, pappeskjum og á teldum ymsastaðni í landinum. Talan er um ljóðupptøkur heilt aftur til um ár 1900 við bæði tónleiki og samrøðum, myndir, og skrivaðan tekst. Eingin ivi er um, at hetta tilfarið eigur at verða savnað, meðan tað enn er tøkt, og almenningurin eigur at hava atgongd til tað.

Savnsgull er eitt dømi um, at nógv tilfar er bjargað, men enn hevur almenningurin ikki atgongd til tað. Eisini annað tilfar liggur ymsastaðni, og lítið skal til, fyri at tað fer fyri einki.

Fleiri einstaklingar hava gjørt eitt stórt arbeiði fyri at savna og varðveita hetta tilfarið, men tað liggur spjatt ymsastaðni, og fá vita um tað. Onkrar ljóðupptøkur við føroyskari luttøku liggja eisini uttanlands, og sum skilst, hevur tað ikki verið lætt at fingið fatur á teimum.

Fyri at fáa hetta skipað má avgerð takast um, hvar tilfarið skal liggja, hvussu almenningurin kann fáa nyttu av tí, og hvussu arbeiðið skal fíggjast.

Tíðin gongur, og so hvørt sum tey ið varða av tilfarinum fella frá, veit eingin, at tað yvirhøvur er til, og hvar tað liggur. Eisini eru í nógvum førum fáar upplýsingar um, hvør er við á upptøkum og myndum, og tí er neyðugt at spyrja tey, ið minnast hendingarnar, men hesi fækka í tali, og tey, ið eru eftir eru, komin væl upp í árini.

Hesin fyrispurningurin verður settur fyri at varpa ljós á málið, soleiðis at gongd kann koma á hetta týdningarmikla arbeiðið, áðrenn tað er ov seint.

Á Løgtingi, 10. juni 2025

Helgi Abrahamsen